## Tveir burtur hvørjaferð

Hvørja ferð tað er løgtingsfundur, eru í miðal tvey av umboðunum, sum fólk hava valt at umboða seg, ikki á fundi. Tað vísir ein uppgerð, sum Sosialurin hevur gjørt við støði í gerðabókini hjá løgtinginum. Tveir tingmenn hava frá ólavsøku til jólar verið burtur frá 10 ferðir ella meira, meðan átta tingmenn ongantíð hava forsømt ein fund. Sverre Midjord hevur verið burtur oftast – 14 ferðir – og Vilhelm Johannesen næstoftast – 10 ferðir. Tey átta, sum hava møtt hvørjaferð, eru: John Johannesen, Gerhard Lognberg, Edmund Joensen, Henrik Old, Alfred Olsen, Torbjørn Jacobsen, Anita á Fríðriksmørk og Bill Justinussen.

## Landsstýrismaður reyk

Jógvan við Keldu verður sagdur úr starvinum sum landsstýrismaður við innlendismálum.

- Talan er um eina heildarmeting av støðuni. Vit hava yvir eina tíð mett um støðuna í hesum málinum. Og niðurstøðan er, at har hevur verið ov nógvur ófriður um fleiri mál, og í longdini kann hetta ganga út yvir virkisførið hjá landsstýrinum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Tað verður róð fram undir, at Fólkaflokkurin hevur mist álitið á Jógvani við Keldu sum landsstýrismaður.

– Hevur flokkurin ikki álit mær, so havi eg í øllum førum álit á mær sjálvum. Hinvegin so undrar tað meg, at flokkurin ikki hevur álit á einum manni, sum hevur tænt flokkinum í meiri enn 35 ár, sigur Jógvan við Keldu.

## Heiðraðir fyri bjarging

Kollfirðingarnir Christian Christiansen og Jens Joensen verða heiðraðir av Carnegie Belønningsfond fyri at hava bjargað Hans Magnus Hansen úr havsneyð á Norðhavinum. Hans Magnus stóð hjálparsleysur uppi á stýrhúsrútinum á sokna báti sínum, tá ið hann varð bjargaður. Umframt diplom var virðislønin 10.000 krónur í part.

*[ Desember ]*

# Marius var errin – men skuffaður



*Føroyski bólkurin Marius stóð seg væl í stórari tónleikakapping í London. Føroyar vóru fremsta norðurlandi í kappingini, og tað var nakað at fegnast um*

**Hans Marius Ziska var á odda fyri bólkin Marius, sum varð við í stóru aljtóða tónleikakappingini The Global Battle Of The Bands. Føroyski bólkurin endaði sum nummar 6 av 24 bólkum, og Føroyar stóðu seg best av øllum norðurlondunum í kappingini**

Fyri fyrstu ferð var ein føroyskur tónleika bólkur við í finaluni í altjóða tónleikakappingini The Global Battle Of The Bands. Hesaferð varð finalan hildin í Astoria í London, og bólkar úr 24 londum vóru við.

Úr Føroyum var tað bólkurin Marius við sangaranum Hans Marius Ziska á odda. Bólkurin vann føroysku kappingina, og í London stóðu teir seg eisini væl.

Marius deildi sætta plássið í finaluni í The Global Battle Of The Bands við amerikansku favorittarnar Bulding A Better Spaceship, og hetta má metast, sum eitt sera heiðurligt úrslit. Marius gjørdist sostatt besti norðurlendski bólkur framman fyri Noreg, Svøríki, Danmark, Finnland og Ísland.

Oddamaðurin, gittarleikarin, sangskrivarin og sangarin í Marius, Hans Marius Ziska viðgekk beint aftan á at raðfylgjan varð kunngjørd, at hann hevði blandaðar kenslur um sætta plássið.

– Sjálvandi er tað ongantíð stuttligt ikki at vinna. Men eg eri glaður fyri at hava givið Føroyum ein plasering. Hetta er jú fyrstu ferð vit luttaka. Tað hevði verið keðiligt ikki at verðið nevndur, so á tann hátt er tað gott, segði Hans Marius.

### Heiðurligt tap

Hans Marius leggur dent á, at hann, sum allir aðrir føroyingar, er troyttur av at hoyra um heiðurlig tap, hvørja ferð landsliðið í fótbólti til dømis. tapur 7-1. Men tá tað er sagt, so heldur hann, at hetta er eitt úrslit, teir kunnu vera ernir av.

Limirnir í Marius hava eisini alla orsøk til at vera ernir. Millum føroysku áskoðararnar var spenningurin stórur móti endanum. Tí tað var greitt, at hetta kundi gerast ein sigur. Eingin greiður vinnari var, og fólk høvdu nógv ymisk boð – millum annað Marius.

– Framførslan hjá Marius var ordiliga góð, og bólkurin var fyri meg persónliga eitt gott boð uppá ein vinnara, tó í tættari kapping við Mexico, Holland og Skotland. Løgini vóru popputtur rokkur sungin og spæld væl. Marius hevur ment seg nógv hetta seinasta hálva árið, og hevði eitt øgiliga heiltstoypt konsept, har var útstráling, løg, tekstir og spæl sum hekk væl saman. Bólkurin umboðaði Føroyar væl, skrivar ummælarin hjá Sosialinum.

– Eins og allir hinir bólkarnir spældi Marius tvey løg, og vísti her fjøllbroytni í bólkinum. Fyrra lagið hevði meira dýpd, meðan tað seinna við niðurlagnum, sum koyrir umaftur og umaftur, lætt kundi gjørst ein landaplága.

Tá avtornaði, var tað tann rái eitt sindur punkkendi rokkbólkurin Kopek úr Írlandi, ið fór við sigrinum.

### Ov harður rokkur

Finalan í Global Battle Of The Bands gjørdist sum heild ein áhugaverd og stuttligt tónleikaupplivîng, har nakrir bólkar veruliga skaraðu framúr. Sum fráleið gjørdist konsertin næstan ikki til at halda út, at hoyra 24 bólkar spæla í samfullar 5 tímar, setir stór krøv til oyrini á áhoyrarunum, og ikki minst hjá dómarunum. Tann harði rokkurin var væl umboðaður, og tá íslendsku Fanngean komu á pallin sum bólkur nummar 23 og spældu enn eina harða tungmálmskonsert, hevði bólkurin ikki ein livandi tjans fyri at gera seg galdandi. Oyrini vóru mett, og tað gjørdist bara larmur.

Eisini Hans Marius sangari í Marius, helt tann harða rokkin vera eit sindur ov nógv av tí góða. Hann segði, at kappingin sum heild var merkt av ov nógvum NU-Metal bólkum, og var satt at siga eitt sindur skuffaður av tí manglandi fjøllbroytninum.

» Í Føroyum gera vit ikki mun á fólki, og vit happa ongan. Tað hava vit bundið okkum til við lóg, og tann lógin umfatar eisini tey samkyndu. Tað fer at gera viðurskiftini óneyðuga fløkt attaka ein bólk burtur úr og gera serlógir fyri tann bólkin. «

*- Edmund Joensen, løgtingsformaður*

» Eg havi ongantíð trúð uppá hesar annars seiglívaðu myturnar um kúgaða offrið, sum okkurt slag av heilagari hetju. Eg trúgvi heldur, tað er øvut, at jú meir tú traðkar á menniskju, jú størri er møguleikin fyri, at tú bara traðkar djevulin í teimum fram. «

*- Carl Johan Jensen, rithøvundur*

**Fótbóltsspælarin Jón Rói Jacobsen ger ein trý ára yrkissáttmála við superligaliðið AaB í Aalborg. Har verður hann liðfelagið hjá Súna Olsen.**